## Spældi við brotnum beini

At tað ber til at spæla fótbólt, hóast bein er brotið, er nýggi vongverjin hjá NSÍ, Jónas Þór Næs dømi um. Í 1-0 sigrinum á HB næstsíðsta hóskvøld var Jónas á høgra vongverja, inntil tað bara restaði ein lítil løta. Tá ið hann varð skiftur út, sást tað væl, at hann var skaddur. Ætlanin var, at Jónas skuldi við NSÍ til Georgia. Men tá ið hann undan fráferðini varð kannaður í røntgenini, vísti tað seg, at eitt bein í fótablaðnum var brotið! Tí var Jónas ikki við NSÍ í Georgia. Tað verður roknað við, at beinið brotnaði longu, tá ið Jónas fyrr í summar spældi við Køge. At tað – hóast brotið – hevur borið nærlagda vongverjanum til at spæla, kemst av, at brotið liggur væl og er við at vaksa saman aftur. Í NSÍ verður roknað við, at Jónas verður tøkur, tá ið NSÍ mikukvøldið 6. august fer at spæla toppdyst á útivølli ímóti EB/Streymi.



## Finsk floyta

Tá ið NSÍ og Dinamo Tbilisi týskvøldið klokkan 19 fara at spæla á ovara vølli í Gundadali, verður tað ein finni, sum verður 23. maður á vølli. Dómarin eitur Tero Nieminen. Hjálpardómarar verða Miikka Poikselkä og Jan-Peter Aravirta. Fjórði dómarin verður Heikki Pajunen. Teir eru allir úr Finnlandi. UEFA umboðsmaður verður Adrian Titcombe úr Onglandi, og dómaraeygleiðari verður Jonas Braga úr Litava. Týskvøldið og mikukvøldið verða fjúrtan dystir í fyrsta innleiðandi umfari í europeisku meistarakappingini.

NSÍ - Dynamo Tbilisi:

# Jens Martin verður aftasti skansi

**NSÍ hevur heitt á veteranin um at verja málið týskvøldið í staðin fyri Tórð Thomsen, sum eftir útvísingina í Georgia er leikbannaður**

**UPPTAKT**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá ið NSÍ týskvøldið klokkan sjey fer á ovara vøll í Gundadali at spæla ímóti Dinamo Tblisi, verður ein ógvuliga royndur maður millum NSÍ stólparnar. Jens Martin Knudsen hevur fingið boð, tí NSÍ er í uppisetri fyri málverjar.

- Tórður Thomsen varð útvístur, tá ið hann í síðstu løtu í Georgia sá gula kortið fyri aðru ferð. Annar málverji hjá okkum er Predrag Zivkovic. Hann er farin til hús í summarfrí, tí hann er ikki førur fyri at spæla. Fyrr í ár breyt hann ein fingur. Tá ið hann aftur fór at venja, var aftur galið, og harvið hava vit ongan eykamálverja.

Soleiðis greiðir Pauli Poulsen, hjálparvenjari hjá NSÍ, sum hevði ábyrgdina av liðnum í Georgia, frá. Tá ið Tórður varð rikin av vølli, fór vinstri vongverjin, Einar Hansen, í málið.

Tá ið NSÍ boðaði UEFA frá, hvørjir spælarar vóru á listanum til undankappingardystirnar í europeisku meistarakappingini, var Jens Martin ikki nevndur. Reglurnar siga, at tað, eftir at síðsta freist er farin, er loyvt at boða frá einum spælara afturat. NSÍ gjørdi nýtslu av tí rættinum. Teir boðaðu UEFA frá, at Jónas Þór Næs skuldi setast afturat. Nú hava teir so heitt á UEFA um at fáa enn eitt navn á listan.

- Tað eru onnur í felagnum, sum hava tikið sær av hesum málinum, men vit ganga út frá, at tað fer at bera til at finna eina loysn upp á henda trupulleikan, tí tað ber ikki til at spæla uttan málverja, heldur Pauli Poulsen.

Jens Martin Knudsen vandi við NSÍ fríggjakvøldið og aftur í vikuskiftinum.

NSÍ spælararnir hildu annars, at talan var um rættuliga harðan dóm, tá ið Tórður Thomsen varð vístur av vølli í Georgia. Fyrra gula kortið varð givið, tá ið málverjin var orsøk til brotsspark. Í seinna førinum varð kortið givið, tí dómarin metti, at NSÍ málverjin hevði hug at draga tíðina út. Hetta var í yvirtíðini.

Dómarin hevði ikki frammanundan givið málverjanum eitt vink um, at hann skuldi ansa sær. Tað plaga dómarar at gera í sovornum førum, áðrnn teir fara í lumman eftir gula kortinum.

Tað tóktist heldur ikki sum um, at dómarin hevði gáað um, at málverjin longu var skrásettur fyri gult kort, tá ið hann vísti gula kortið fyri aðru ferð. Tað var ikki fyrrenn, at hann fór at føra bókhaldið, at hann tóktist gerast greiður yvir, at Tórður Thomsen skuldi vísast av vøllinum.

*- Tað eru onnur í felagnum, sum hava tikið sær av hesum málinum, men vit ganga út frá, at tað fer at bera til at finna eina loysn upp á henda trupulleikan, tí tað ber ikki til at spæla uttan málverja, heldur Pauli Poulsen, sum vónar, at tað fer at eydnast teimum at fáa Jens Martin Knudsen skrásettan og tøkan*




# Miðvøllurin verður væl mannaður

**Hóast teir í NSÍ siga seg rokna við betri úrsliti hesa ferð enn í Georgia, so ætla teir ikki at spenna álopsbogan**

**UPPTAKT**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt tað undarligasti kapitli í altjóða føroysku fótbóltssøguni varð skrivað í 2004. Ta ferðina spældi HB í innleiðandi umfarinum í meistarakappingini ímóti FC WIT Georgia. Á útivølli legði HB rygg til 5-0 tap. Kortini gjørdist tað heilt spennandi, tá ið georgiska liðið vitjaði í Gundadali. HB vann 3-0, og fram ímóti dystarenda hómaðist møguleikin fyri, at HB skuldi taka stóra tapið á útivølli aftur.

NSÍ tapti týskvøldið 3-0 í Georgia. Í annaðkvøld eigur NSÍ heimavøll ímóti georgiska liðnum, sum kom til Føroya í gjár, men ætlanirnar hjá NSÍ eru ikki at leypa á við nógvum fólki:

- Har niðri spældu vit í 1. hálvleiki 4-1-1. Tá skoraðu teir skjótt trý mál. Í 2. hálvleiki hildu teir fram við høgari ferð, men vit megnaðu í nógva hitanum at halda tætt. Orsøkin var fyrst og fremst, at vit umskipaðu soleiðis, at vit vóru í 4-5-1 uppstilling. Tá fingu vit betri fatur á fínu sentralu miðvallarunum og síðuspælarunum, og tað ætla vit eisini at gera í morgin, sigur Pauli Poulsen, sum í Georgia hevði ábyrgdina av NSÍ liðnum.

Harvið er ikki sagt, at teir í NSÍ ikki vóna, at tað skal eydnast at flyta liðið longri fram enn í georgiska hitapottinum, og at tað harvið skal eydnast at spæla seg til málmøguleikar. Men talan var ikki um fyrilitarleyst álopsspæl.

- Vit eiga bólttryggar sentralar miðvallarspælarar, og vit skulu royna at halda upp á bóltin. Tað er í sær sjálvum avbjóðing, tá ið trýstið er so stórt, heldur Pauli Poulsen, sum minnist aftur á, hvussu væl georgiska liðið dugdi við diagonalsendingum at fáa NSÍ liðið út av javnvág og harvið at nýta nógva orku.

- Í hitapottinum, sum vøllurin var, megnaðu okkara at arbeiða nógv og hart og at halda tætt síðsta tíman. Krøvini verða tey somu í morgin. Tað vil siga, at vit mugu liggja væl tættari í teimum, enn vit gjørdu fyrsta hálva tíman, tá ið teir tóku okkum rættuliga av fótum.

Tá ið vit fregnast eftir, hvørjar av georgisku spælarunum tað serliga skal leggjast til merkis, vísir Pauli Poulsen á fleiri:

- Teir vóru í 4-2-3-1 uppstilling. Sentralur aftanfyri fremsta mannin var nr. 10. Tað sigst, at fleiri feløg í Vestureuropa hava áhuga í honum. Nr. 18 er liðformaður og spælfordeilari á verjukendum sentralum miðvallarplássi. Hann og 8arin stóðu seg væl, og so høvdu teir heilt góðar spælarar í síðunum, sum eru nummar 21 og 49. Men bæði sum einstaklingar og lið eru teir væl yvir okkara støði, hóast teir framvegis fyrireika seg til landskappingina, sum teir ikki enn eru farnir undir.